# Havnin fær løgfrøðing



*Eyðbjørn Larnsen er nýggi løgfrøðisligi ráðgevin hjá Tórshavnar kommunu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Eyðbjørn Larsen er settur í starv sum løgfrøðisligur ráðgevi hjá Tórshavnar kommunu. Hann skal tryggja, at arbeitt verður eftir fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit, verður sagt**

NÝTT STARV
*Eyðun Klakstein*

Týsdagin boðaði Tórshavnar kommuna frá, at hon hevur sett ein løgfrøðing at lata kommununi løgfrøðisliga ráðgeving.

Nýggja býráðssamgongan setti sær fyri, at ein løgfrøðingur skuldi starvast á stjórnarskrivstovuni hjá kommununi, og síðst í januar var søkt eftir fólki.

Fimm umsóknir komu til starvið, og burtur úr teimum varð Eyðbjørn Larsen valdur.

Hann er 34 ára gamal og hevur seinastu árini starvast hjá Kommunala Eftirlitinum í Innlendismálaráðnum. Eyðbjørn Larsen tekur við starvinum í Tórshavnar kommunu 1. apríl.

Endamálið við setanini er at menna tann fyrisiting-arliga førleikan hjá Tórshavnar kommunu og millum annað at tryggja, at arbeitt verður sambært fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit.

Tórshavnar kommuna hevur seinnu árini millum annað fingið ábreiðslur frá Løgtingsins Umboðsmanni um ávísar málsviðgerðir.

STARVSLÝSING

## Hjálparfólk

**Søkt verður eftir hjálparfólki til starvsfólkadeildina at byrja beinanvegin. Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um innan- og uttanhýsis ørindi, avloysing í móttøkuni við telefon, posti og annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni.
Arbeiðstíðin er í løtuni frá kl. 08.00-16.00.

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir ungum fólki við students-, HF- ella HH-prógvi, og sum ætlar sær at fara undir víðari útbúgving í 2006.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda

Landsverki
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 7. mars 2005. Merkið brævbjálvan "Umsókn eftir hjálparfólki".
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 311 333 frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

SANSIR TEL 355 355

# Kundarøktari til Kall

Kall økir alsamt um virksemið og okkum tørvar kundarøktarar.

Er tú ágrýtin, sølumindaður, góður at samstarva við, kanst arbeiða sjálvstøðugt so er tað kanska tær vit hava brúk fyri.

Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:
- Søla til privatkundar
- Hjálp og vegleiðing til kundar
- Tilsetan av kundatænastum
- O.a. fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Vit hugsa okkum at tú hevur royndir við at arbeiða við kundum. Arbeiðið hevur skiftandi arbeiðstíðir og neyðugt er at tú kanst arbeiða um kvøldi.

Vit kunna bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligar og fakligari menning á einum arbeiðsplássi ið vil vaksa seg stórt í kunningarmeldrinum.

Lønin verður ásett eftir førleika og royndum.

Skrivlig umsókn við prógv og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. mars 2005 kl. 12.00

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Hevur tú spurningar til starvið kanst tú ringja til Bjarna Askham Bjarnason stjóra á telefon 502085



Kall veitir fastnet, GSM og breiðband í Føroyum. Á Kalli arbeiða í løtuni 16 fólk.

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo

kall Orðið er títt